FOTOAVRIT

Viðtøkur fyri Nólsoyar Bygdarsavn.

gr. 1.

Nólsoyar Fornminnisfelag setur á stovn sjálvognarstovnin Nólsoyar Bygdarsavn.

gr. 2.

Endamál stovnsins er í Nólsoyar Kommunu

- at savna, skráseta og varðveita forngripir, myndir, skjøl og annað tilfar av søguligum áhuga fyri bygdina,
- at seta upp siðsøguliga framsyning,
- at fremja varðveiting av fornminnum, gomlum bygningum og umhvørvum.

Í varðveitingararbeiðinum kann savnið útvega sær fastar ognir og umsita tær.

gr. 3.

Nólsoyar Bygdarsavn verður stýrt av nevnd Nólsoyar Fornminnafelags.
Stjórnin skipar seg sjálv við formanni, skrivara og kassameistara.
Stjórnin stendur aðalfundi Nólsoyar Fornminnafelags til svars fyri ognum og rakstri savnsins.
Nevndini er heimilað at útvega sær lønta arbeiðshjálp.

gr. 4.

Roknskaparár bygdarsavnsins er álmanakkaárið. Roknskapurin verður góðkendur av stjórnini, grannskoðaður av statsautoriseraðum ella skrásettum grannskoðara og skal síðan verða góðkendur av aðalfundi Nólsoyar Fornminnafelags.
Soleiðis góðkendur roknskapur verður latin landsantikvarinum.

gr. 5.

Til útvegan og veðsetan av fastari ogn krevst styrissamtykt og undirskrift frá formanni og 2 styrislimum.

gr. 6.

Gevst bygdarsavnið við virksemi sínum, verður farið fram eftir grein 3, stk 3 í løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentunarsøguligum virksemi við seinni broytingum.

Soleiðis samtykt á eykaaðalfundi í Nólsoyar Fornminnafelag tann 23. sept. 1990.

Tóta Joensen — Hans M. Hansen
Anna J. Thomsen — Elin Hansen
Páll Thomsen

2

2209 – 8/91 – →

Góðkendar.

FØROYA LANDSSTÝRI, 4. november 1992

landsstýriskona